# TÍÐINDI

SAMBAND
KÁRI MIKKELSEN
KARIM@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# Mundi klænka seg í hel

**Nógv umrødda bókin hjá ungu gentuni Judith Fathallah, sum mundi klænka seg í hel, er nú komin á føroyskum**

BÓK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

*At temja apuna* er heitið á nógv umrøddu bókini hjá Judith Fathalla, sum byggir á hennara egnu royndir við herviligu sjúkuni anorexi.

Heitið á bókini sipar til hvussu gentan 13 ára gamla Jessica kendi tað sum, at ein apa sat innan í henni og gav henni boð um, hvat hon skuldu eta.

### Tín feita súgv

Í bókini er apan sum ein brennandi rødd, sum sigur Jessicu, at hon er ein feit súgv og tað at vera kløn var einasti máti at gerast trygg og viðurkend og fram um alt einasti máti at flyggja frá vaksnamannaárunum, sum standa og hótta fyri framman.

Í bókini minnist Jessica, hvussu hon hugsaði:

»*Eg granskaði allatíðina hópin av bikiniklødddum gentum og kendi meg ræðuliga illa. Hevði eg sæð út sum tær, hevði alt verið gott. Hevði eg bara verið kløn, hevði eg kunnað alt. 1,52 m og 63,5 kg í hædd og vekt vuksu í sinninum á mær. Bókstaviliga. Eg fór at gera venjingar hvønn morgun og granska meg sjálva í speglinum, í døpurhuga um støddina av búki, miðju og lørum. At lata meg í svimjudraktina fyri fyrstu ferð í mánaðir var ein marra*«

Jessica lurtaði eftir røddini og aktaði hana, til røddin næstan hevði dripið hana. Til endan var hon so kløn, at hon av álvara var í lívsvanda.

Men spakuliga byrjaði hon at muta ímóti boðunum frá apuni og lata oyruni aftur, tá hon teskaði at Jessica var bæði feit og ólekkur. Men hóast stríðið við sjúkuna bæði gjørdist drúgt og hart, eydnaðist tað til endan at basa sjúkuni og gerast frísk aftur.

Tað er bókadeildin sum gevur út bókina, sum Malan Háberg hevur týtt.




*Bókin „At temja apuna“ byggir á egnu royndirnar hjá høvundanum við herviligu sjúkuni anorexi*



*Nakrir av okkara royndastu sjónleikararum sleppa nú av álvar at royna seg við øru keipunum hjá løgnu skapningunum úr Geyma*

# Ørur sangleikur á pall

**Komandi vikuskifti fara nakrar av bestu sjónleikarakreftunum í landinum at royna seg í øra sangleikinum Í Geyma**

SANGLEIKUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurun.fo*

Tað verður ein sera øðrvísi sangleikur, nakrir av okkara royndastu sjónleikararum fara á pall við komandi vikuskifti í Norðurlandahúsinum

Óvanliga livandi sangleikurin Í Geyma er fyri øll í aldrinum 4 til 104 ár og byggir hann á barnabókina hjá Dánjali Hoydal

### Frá bók til sangleik

Stutt eftir at bókin kom út í 2002 fekk Tjóðpallur Føroya hugskotið at gera hana til leik. Saman við kenda íslendska leikstjóranum Ágústu Skúladóttir hevur Dánial Hoydal síðani umskrivað leikin til sangleik, tí orðaspælið í bókini leggur upp til sangir og tónleik. Kim Hansen játtaði at gera tónleikin og fer saman við Magnus Johannesen og Brandi Jacobsen at framføra hann á palli saman við sjónleikarunum.

Tað verður ein sera øðrvísi sýning, tí Ágústa Skúladóttir er von at gera sera livandi framførslur, har klóvnakeipur og skemt eru berandi innihald. Royndi leikarahópurin, sum fevnir um kendar sjónleikarar sum Hans Tórgarð, Biritu Mohr, Riu Tórgarð, Gunnvu Zachariassen, Riu Tórgarð, Petur Meinhard E. Andersen , Rakul Thomsen og Gutta Winther sleppur tí av álvara at royna seg við øru keipunum hjá løgnu skapningunum úr Geyma.

Handan pallin hevur Ágústa Skúladóttir tvær aðrar royndar kreftir úr Íslandi, pall sniðgevan Guðrun Øyahals og búna sniðgevan Katrin Þorvaldsdóttir, umframt ljóssnigevan Árna Baldvinsson. Leikurin er ein stór verkætlan fyri Tjóðpall Føroya og verður samstundis fyrsta framførsla í nýggju Athøllini hjá Norðurlandahúsinum.

**Í Geyma - Sýningar:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 7. nov. 2008 | kl. 19.00 | útselt |
| Leygardagin | 8. nov. 2008 | kl. 15.00 | |
| Sunnudagin | 9. nov. 2008 | kl. 15.00 | |
| Týsdagin | 11. nov. 2008 | kl. 19.00 | |
| Mikudagin | 12. nov. 2008 | kl. 19.00 | |
| Hósdagin | 13. nov. 2008 | kl. 19.00 | |
| Fríggjadagin | 14. nov. 2008 | kl. 19.00 | |
| Leygardagin | 15. nov. 2008 | kl. 15.00 | |

STARVSLÝSING



Málsviðgerar/eftirlitsfólk

Matvørudeildin á Heilsufrøðiligu starvsstovuni leitar eftir málsviðgerum/eftirlitsfólkum:

1 fast starv og
2 tíðaravmarkaði størv í eitt ár.

Sí www.hfs.fo ella www.portal.fo.

Freistin at lata umsókn inn er hósdagin 13. november 2008.

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 556 400
Fax +298 556 401
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

VASTI 45010

Tað er í tíðum sum hesum at ein sær hvørjir eru okkara rættu vinir.

*Takk fyri*

IDNVÉLAR
00-354-4142700 • hjortur@idnvelar.is • Ísland
www.idnvelar.is

Sosialurin
...er lisin
-so ert tú við!